## FSF slakar í dómaraútreiðslum

Fótbóltssambandið fer í 2009 bert at krevja helvtina av dómaraútreiðslunum í mansdeildunum og einki í kvinnudeildunum. Feløgini hava gramt seg um, at dómaraútreiðslurnar eru blivnar so stórar, og tað hevur FSF tikið til eftirtektar. Í 2009 sleppa feløgini við helvtina av kostnaðinum, sum annars var í fjør.



## Laudrup fær ikki teir góðu

Danski fótbóltsvenjarin Michael Laudrup ætlaði at styrkja liðið hjá sær, Spartak Moskva, við góðum spælarum í vetur, men tað gongur einki serligt við tí. - Eg havi ikki fingið tann styrk, sum eg ætlaði. Vit fáa ongar spælarar úr Italia, Spania ella Onglandi, tí spælarar vilja heldur sita á beinkinum í teimum kappingunum, enn at spæla fast í Russlandi, sigur Michael Ladrup við Ekstrablaðið.

Neistin-Kyndil 31-20 (18-11)

# Neistin rann grannarnar um koll

**Neistakvinnur halda fast í møguleikanum at vinna sær pláss í Sunset-finaluni. Tær vunnu í gjár greiðan sigur á botnproppinum og grannunum úr Kyndli**



*Jacklin Durhuus hjá Kyndli skjeyt nógv flest mál í grannauppgerðini ímóti Neistanum, men tó var eingin ivi um, at Neistin var klárt betra liðið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

HONDBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Annika Ljósstein hevur júst staðfest sigurin á 31-20 við fáum sekundum eftir at spæla. Hóast dysturin meira ella minni var avgjørdur undan steðginum, verða allir nevarnir á beinkinum hjá Neistanum knýttir og lyftir móti himni. Samanhaldið hevur sigrað.

Neistin heldur framvegis fast í sínum møguleika at spæla seg í finaluna. Bláa høvuðsstaðarfelagið vann í gjár trygt á grannunum úr Kyndli, og varðveitir munin á tvey stig upp til Tjaldur, sum er á øðrum plássi.

### Væl betri fyri

Botnproppurin Kyndil hevur spælt uttan sjálvsálit seinastu nógvu vikurnar, og tað sást væl aftur í grannauppgerðini í gjár. Neistin hevði beinanvegin yvirtakið, og dugdi væl at gera sær dælt av mistøkunum hjá Kyndli. Mótálopini skolaðu í løtum móti málverjanum hjá grønu havnarkvinnunum.

Neistakvinnur tóktust serliga at vera væl fyri kropsliga. Sjálvandi stóð tað væl til í hesum partinum av spælinum samanborið við Kyndil, sum ikki legði nógv fyri. Men í løtum rann Neistin grannarnar um koll. Í steðginum var dysturin longu avgjørdur, tí Neistin var á odda 18-11.

### Tvær finalur bíða

Neistin var greitt omaná í seinna hálvleiki. Tær øktu um leiðsluna, og tá avtornaði vunnu tær við 11 málum, 31-20.

Sigurin hevur við sær, at neistakvinnur framvegis spæla við um atgongumerkini til annað av finaluplássunum. Komandi uppgávurnar ljóða VB á útivølli og Tjaldur á heimavølli. Kravið er fýra stig av fýra møguligum. Neistin hevur tvær vikur at fyrireika seg til fyrsta dystin, og spurningurin er, hvussu Svein Rógvi Nielsen, venjari, fær sum best burturúr.

Neistakvinnur hava vunnið sjey av seinastu átta dystunum, og tí kann steðgurin í landskappingini koma dátt við. Men samanhaldið, sum kom týðiligt til sjóndar í gjár, kann røkka langt. Hvussu langt, fáa vit at síggja tann 22. mars, tá VB bíðar í høllini í Vági.

Kyndil hevur framvegis einki stig vunnið sær í hesum kappingarárinum. Eitt stórt vónbrot fyri havnarfelagið, nú hugnahondbóltur tykist standa ovast á breddanum. Sjálvandi er eingin movitatión í at tapa hvørt vikuskifti, og tað kunnu kyndilskvinnur staðfesta.

**Neistin-Kyndil 31-20 (18-11)**

**Neistin:** Marjun Danberg 4, Unnur Danielsen 4, Annika Ljósstein 4, Stine Mikkelsen 4, Elin Stakksund 4, Heidi Maria Akselsen 3, Rakul Augustinussen 3, Nicoleta Radu Hansen 3, Bryndis Hjartardóttir 1, Tordis Tróndarsson 1

**Kyndil:** Jacklin Durhuus 10, Linda Johannesen 3, Ása Christiansen 2, Annika Poulsen 2, Jórun Ludvig 1, Súsanna Petersen 1, Randi Wardum 1

**Hondbóltur**

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 18 | 14 | - | 1 | - | 3 | 491 | 383 | 108 | 29 |
| 2 Tjaldur | 18 | 11 | - | 3 | - | 4 | 494 | 415 | 79 | 25 |
| 3 VB | 18 | 12 | - | 0 | - | 6 | 514 | 429 | 85 | 24 |
| 4 Neistin | 18 | 10 | - | 3 | - | 5 | 476 | 435 | 41 | 23 |
| 5 StÍF | 18 | 3 | - | 1 | - | 14 | 440 | 549 | -109 | 7 |
| 6 Kyndil | 18 | 0 | - | 0 | - | 18 | 316 | 520 | -204 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF *) | 17 | 14 | - | 0 | - | 3 | 487 | 439 | 48 | 28 |
| 2 H71 | 18 | 12 | - | 0 | - | 6 | 487 | 411 | 76 | 24 |
| 3 Neistin *) | 17 | 11 | - | 0 | - | 6 | 499 | 460 | 39 | 22 |
| 4 StÍF | 18 | 7 | - | 2 | - | 9 | 433 | 456 | -23 | 16 |
| 5 Kyndil | 18 | 4 | - | 2 | - | 12 | 423 | 482 | -59 | 10 |
| 6 KÍF | 18 | 3 | - | 0 | - | 15 | 423 | 504 | -81 | 6 |

*) Kappingarnevndin hevur ógildað úrslitið av dystinum millum Neistan og VÍF tann 18. januar, og tí er hesin ikki roknaður við á stigatalvuni

StÍF-Stjørnan 24-44 (10-20)

# Stjørnan glampaði á Skála

**Alt gekk upp í eina hægri eind – serliga ímóti endanum – tá Stjørnan í gjár spældi uppvísningshondbólt ímóti StÍF í høllini á Skála og vann við 20 málum**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Veruligur klassamunur var á liðunum, tá Stjørnan í gjár vitjaði StÍF og veruliga vísti, at liðið av álvara er farið at hita upp til FM-finalurnar í Sunset-kappingini. Serliga tann parturin, sum hevur við skjótálop at gera, var sjónskur hjá Stjørnuni, sum í løtum fullkomuliga trumlaði StÍF niður.

– Hetta var ein superdystur, har vit veruliga fingu víst, at vit hava fingið nakað burtur úr miðvísu venjingini síðstu tvær vikurnar, har skjótálop er tað, sum hevur staðið fremst á skránni. Vit mundu eisini fáa eini 20 av teimum 44 málunum við skjótálopum, staðfesti ovurfegni Stjørnuvenjarin, Henrik Gerster, eftir dystin.

Gjøgnum allan dystin vísti Stjørnan til fulnar, at liðið hevur nógvar streingir at spæla uppá, og umframt nevndu skjótálop, so vóru eisini onnur mál at síggja. Bæði bakkar og vengur fingu mál, og tað mundi koma serstakliga væl við hjá Stjørnuni, sum ikki júst hevur havt hepni við sær í málskjótingini í síðstuni.

Í seinna hálvleiki sá tað eina løtu út, sum StÍF vildi sleppa meira upp í part, men tað var skjótt, so hevði Stjørnan rist tað av sær. Og ikki minst kom kropsliga styrkin og góðu formurin hjá spælarunum til sjóndar í endaspurtinum, tí síðstu seks minuttirnar fekk Stjørnan níggju mál og StÍF einki…

**StÍF-Stjørnan 24-44 (10-20)**

**StÍF:** Fríðrun Danielsen 9, Rebekka Justinussen 9, Bára Berthelsen 3, Lovisa Andreasen 2, Sunfríð Johansen 1

**Stjørnan:** Simona Petersen 8, Durita Christophersen 6, Edith Hansen 6, Una Olsen 6, Bára Skaale Klakstein 4, Durita Ljósstein 4, Anna Kristina Samson 4, Joan Midjord Djordjevic 3, Diane Møller 2, Durita Mikkelsen 1